# Fara at gera sambýli í Havn til fólk í barndømi

*Miðað verður eftir at gera minst ein stovn um til eldru um árið, tí viðurskiftini hjá teimum eldru er eitt líka stórt mál at loysa sum viðurskiftini hjá dagrøktini*



*Tórshavnar Býráð ætlar sær undir eitt miðvíst arbeiðið at bøta um umstøðurnar hjá teimum eldru og fyribils er ætlanin at fáa gongd á eitt, ella tvey, lítil sambýli, sum eisini skulu gerast serliga til at kunna hýsa eldri fólki í barndømi*

ÁKI BERTHOLDSEN

Tórshavnar Býráð er nú av álvara farið undir at gera umstøðurnar betri hjá teimum eldru í kommununi.

Og Elin Lindenskov, forkvinna í sosialu nevnd, sigur, at ætlanin er í hvussu so er at fáa gongd á ein stovn í ár.

Hon sigur, at Sosiala nevnd hevur stutt síðani havt fund, har eitt nú umstøðurnar hjá teimum eldru vóru til viðgerðar.

– Vit eru ikki komin so langt enn í ár, sum vit høvdu ætlað, tí vit hava ikki havt nakað grundstykki enn.

Men stykkið má so útvegast nú

Hon sigur, at hóast stykkið ikki er útvegað enn, er sosiala nevnd kortini samd um, at halda á við fyrireikingunum, so at tað kann verða klárt at byrja upp á sjálva byggingina beinanvegin eftir ársskiftið.

### Til fólk í barndømi

Elin Lindenskov sigur, at tað, sum Býráðið í fyrstu syftu arbeiðir við, er at fáa gongd á eitt, kanska tvey sambýli í ár, so at tey kunnu verða liðug seint komandi ár.

Peningur er settur av í ár til fyrireikingar og projektering o.s.fr. 500.000 krónur eru settar av til tað í ár, men skal nakað byggjast, má munandi setast av komandi ár.

Forkvinnan í Sosialu nevnd sigur, at av tí at tiltakið enn bara er undir fyrireiking, er nevndin ikki komin til nakra niðurstøðu um, akkurát, hvussu byggjast skal.

– Men tað, sum liggur í kortunum er, at vit skulu fáa gongd á stovnspláss til eini 12-14 fólk.

– Tað, sum eisini liggur í kortunum, er, at vit ætla at gera okkurt fyri at bøta um støðuna hjá teimum eldru, sum eru í barndømi.

– Tí er tað heldur ikki endaliga avgjørt, um talan verður um tvey sambýli, sum kortini liggja saman.

– Liggja tey saman, verður raksturin bíligari, tí tey kunnu hava fleiri hentleikar felags.

– Men eitt sambýli til fólk í barndømi setir onnur krøv til stovnin, enn eitt vanligt sambýli og tí er endalig støða ikki tikin til spurningin enn. Men tað er nakað, sum vit mugu raðfesta, tí fólk í barndømi, hava líka góðan rætt til eitt virðiligt lív, sum øll onnur hava.

Elin Lindenskov sigur, at tá ið hetta er fingið á føtur, heldur hon, at býráðið má í hvussu so er byggja ein stovn um árið, helst meiri, tí eldraøkið er eitt mál, sum er líka átrokandi at loysa sum barnaansingin, og tí má býráðið eisini raðfesta hetta øki frammaliga tey komandu árini.

– Eg kann sjálvandi ikki siga, hvussu nógv verður bygt, tí peningurin skal setast av.

– Men hetta er so tað, sum vit arbeiða fram ímóti og hetta er eisini í samsvari við eldraálitið, sum varð gjørt herfyri, leggur hon afturat.

# Ongi útlit til at prísurin fer at lækka enn

*– Tvørturímóti er tað væntandi, at olja og bensin verða enn dýrari*



*– Fleiri, orsøkir eru til, at prísirnir á olju og bensini eru so høgir nú, og væntandi fer prísurin á bensini enn longur upp, sigur Niels Juel Nattestad, stjóri í Statoil í Føroyum*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Tað eru ongi útlit til, at prísirnir á bensini og olju fara at lækka aftur fyribils.

– Tvørturímóti vænti eg, at bensinprísirnir fara at hækka enn meiri ein av komandi døgunum.

Tað heldur Niels Juel Nattestad, stjóri á Statoil í Føroyum.

–Prísirnir hækkaðu í farnu viku og tað tykist ikki, at gongdin fer at vendast fyribils. Tí vænta vit, at prísurin á bensini fer enn longur upp onkran av komandi døgunum.

Men um hann endar uppi á yvir níggju krónum fyri liturin, sum onkur spáar, er ilt at siga, heldur hann.

Men tað er tætt við, tí beint nú kostar blýfría bensini 8,73 fyri liturin og kaliumbensin kostar 8,86 krónur fyri liturin.

Eisini oljan er blivin nógv dýrari og hon er dýrka næstan eina krónu seinasta árið.

Men nú um dagarnar er tað hlst bensinið, sum er dýrkað - og fer at dýrkað.

### Fleiri orsøkir

Niels Juel Nattestad sigur, at tað eru fleiri orsøkir til, at prísirnir eru so høgir nú.

–Eitt er at goymslurnar verri enn so eru so stórar, sum ynskiligt er og tí kemur fjáltur á. Ein orsøk til tað er, at virksemið er vaksið nógv skjótari enn væntað eftir kreppuna í Asia, og tað hevur gjørt, at oljunýtslan er vaksin nógv skjótari, enn væntað.

– Somuleiðis tykist tað, at OPEC londini megnað at halda saman og at semjast um at halda framleiðsluna á einum ávísum støði.

– Londini, sum brúka olju, hava roynt at lagt trýst á OPEC londini um at hækka framleiðsluna, men tað er ivasamt, men tað hava tey higartil víst aftur.

Niels Juel Nattestad sigur, at ein OPEC fundur verður aftur í juni mánaða og tað er við stórum spenningi, at marknaðarlondini bíða eftir úrslitinum av tí fundinum, tí tað fær avgerandi týdning fyri gongdina í oljuprísinum framyvir.

– Men hartil kemur so eisini, at prísurin á olju verður oftani ásettur eftir, hvussu útlitini eru. Eru útlit til, at prísurin skal fara upp ella niður, reagerar marknaður frammanundan og hækkar ella lækkar frammanundan.

Og at enda nevnir stjórin í Statoil, at dollarin er bara gingin uppeftir, og tá ið olja verður goldin í dollarum, ger tað eisini sítt til, at oljan er blivin so dýr.

Hann nevnir t.d., at um árskiftið var dollarin uppi á 7,27 kr. men nú hevur hann verið heilt uppi á 8,37 kr. og vent. Sostatt er hann hækkaður meiri enn eina heila krónu uppá tríggjar mánaðir.

–Hetta er ein høvuðsorsøk til, at prísurin á olju og bensini eru so høgur, s igur Niels Juel Nattestad.

# Tað var ov dýrt

*Býráðslimir á Tvøroyri vilja ikki á skeið fyri 10.000 krónur í part*

ÁKI BERTHOLDSEN

–Fínt skal tað vera.

Hetta var ein viðmerking á býráðsfundi á Tvøroyri mikukvøldið.

Tvøroyrar Kommuna er limur í Býarfelag Føroya.

Og haðani var eitt tilboð komið, sum Tvøroyrar Býráð skuldi taka støðu til á fundinum mikukvøldið.

Býarfelagið hevur sent øllum limakommununum eitt tilboð um at halda skeið fyri býráðslimum.

Skeiðið skal vera í Danmark í vár og tað kostar 10.000 krónur fyri hvønn býráðslim. Tað varar eina viku og endamálið við tí er at læra býráðslimir at fáast við kommunalpolitikk.

Men uppskotið fekk kaldliga móttøku í Tvøroyrar Býráð

–Fínt skal tað vera, helt Heri Mortensen, sum ikki dugdi at síggja nakra meining í at senda býráðslimir í Føroyum niður til Danmarkar á skeið. Hann helt, at tað mátti verið bíligari at fingið ein skeiðleiðara til Føroyar at halda skeið, enn at flyta fleiri býráðslimir til Danmarkar.

Bergur Bærentsen tók undir og minti á, at tá ið hetta býráðið var nývalt, var eitt dagsskeið í Havn fyri nývaldar býráðslimir og tað hevði verið gott.

Dánjal av Rana minti eisini á at einaferð í sjeytiárunum hevði skeið verið í nakrar dagar á háskúlanum í Havn fyri bý- og bygdaráðslimir, og tað hevði eisini gjørt nyttu.

Men tað var sum um alt skuldi blásast so nógv upp nú.

Aðrir býráðslimi vístu eisini á, at kommunuval verður seinni og ár, so at teir býráðslimir, sum møguliga fara á skeið, verða kanska nakrir heilt aðrir, enn teir, sum hava samtykt at fara á skeið.

Og býráðslimir á Tvøroyri hildu ikki, at tað var rætt, at hetta býráðið samtykti at senda eitt komandi býráð á eitt skeið, sum tað kanska ongan áhuga hevði í, serliga tá ið tað var so dýrt. Niðurstøðan á býráðsfundinum á Tvøroyri varð sostatt, at tað varð einmælt samtykt at havna tilboðnum frá Býarfelagnum.





*Glorybox á pallinum í Sjónleikarhúsinum*

# Brimgangur í Sjónleikarhúsinum

ORÐ OG MYNDIR: JOHAN JACOBSEN

Ljóð verða oftast samanborin við bylgjur. So ein kann siga, at veruligur brimgangur var í Sjónleikarhúsinum leygarkvøldið. Brimið dundi og alduskvatl kýndi hoyrnina. Her er nú ikki talan um vatnskaða ella nakað líknandi, men eitt tónleikatiltak.

Glorybox, sum nú fyrireika seg til at spæla á Roskilde Festivalinum i Danmark, hevur havt eina lítla konsertferð her á Føroya klettum. Hetta er ikki fyrstu ferð, Glorybox hevur spælt her. Fyri einum ári síðan hevði bólkurin tvær konsertir í Føroyum, í Gøtu og í Klaksvík. So fólk kenna kanska eitt sindur til bólkin.

Trupult er at seta eitt heiti á tónleikin, men "Noise-pop" hevur verið uppi og vent. Guitarljóð við effektum eru dominerandi og seta landslag tónleikin. Helst eru hetta eksperimenterandi tónar, ið eru tætt knýttir at tónleikarunum sjálvum. Okkara egna føroyska veðurlag hevur nógv til felags við tónleikin hjá Glorybox. Tað skiftir so lýðandi, frá sól til regn, frá heilt góðum veðri til kolandi storm. Og brimið brýtur til dømis í "digitalum lava".

### Føroyingur við

Nevnivert er í hesum sambandi, at guitaristurin Jan Johansen er føroyingur. Og tað ber næstan til at síggja, at tað fer at regna í tí væleydnaða »Farewell«, sum hann sjálvur syngur. Við guitarfeedback og øðrum ljóðeffektum gevur hann sangunum sín serliga lit.

Bassisturin, Je, ber sangirnar har teir skula. Á konsertunum virkar tónleikurin ofta við meiri livandi mátti, enn fløgan kann gera, og her eiga bassisturin og nýggi trummusláarin sín grundleggjandi lut. Sarah Heburn hevur eina rødd sum ein eingil; hon hoyrist betri á "Vacuum", sum higartil er einasta fløgan av Glorybox; hon kom út í fjør.

Pallframførslan var livandi og stuðlaði tónleikinum heilt væl. Tey hava roynt tað fyrr; altso, traðka á ein pall. Bólkurin hevur verið á konsertferð ymsastaðni í Evropa og USA, og talan hevur eisini verið um ein møguligan túr til Japan. Og sum sagt verður Glorybox eisini á Roskilde Festivalinum í summar.

### Eisini friðarligt

Nógv lív var í tónleikinum hetta kvøldið á pallinum í Sjónleikarhúsinum, og einstakir áskoðarar vóru við upp á tað og flippaðu við; men tey flestu vóru meira føroysk í tí. Kvøldið eftir var konsertin í Losjuni í Gøtu. Her var eingin pallur, og tað virkaði sum bólkurin dámdi tað betri. Meiri javnvág var millum bólk og áhoyrarar hetta kvøldið.

Endin á konsertini eydnaðist serliga væl, ein meiri friðarlig løta, har Sarah betri slapp at útfolda sína einglarødd. Endað varð við einsartaðum tónum, sum "sjálvir" spældu upp móti rokinum frammanundan. Ein serligur endi, og í mun til heildina friðarligt.

Sjáldsamt er at síggja ein so væl samanspældan og "professionellan" bólk spæla fyri eitt sindur yngri føroyskum, tónleikaáhugaðum, áhoyrarum; alt ov sjáldsamt. Eitt veldugt tiltak, sum vónandi verður endurtikið.

# Savna undirskriftir í Klaksvík

FRÓÐI LØKSÁGARÐ



Í sendingini Fimmarin í Útvarpi Føroya mikudagin, kom fram, at partur av kirkjufólkinum í Klaksvík, var farin undir at savna undirskriftir, fyri at mótmæla avgerðini hjá einum meiriluta av kirkjuráðnum, og teimum báðum prestunum, Niels Paula Danielsen og Hans Eiler Hammer, at nokta Karsten Nissen, bispi í Viborg, at prædika í Christianskirkjuni.

Ásbjørn Lómaklett sum er ein av stigtakarunum til innsavnanina av undirskriftum sigur, at hetta fyrst og fremst verður gjørt fyri at vísa á óngøgdina hjá stórum parti av kirkjufólkinum í Klaksvík, um tað sum hann nevnir fundamentalistisku avgerðina hjá einum meirluta av kirkjuráðnum og teimum báðum prestunum

Asbjørn Lómaklett, sigur víðari, at tey sum standa fyri innsavningini, ikki taka nakra støðu í málinum um tey samkyntu, men bara vilja átala tað ófólkaligu viðferð bispurin í Viborg, Karsten Nissen, hevur fingið í hesum máli. -Hetta er stór skomm, sigur Asbjørn Lómaklett, sum sigur víðari, at hetta er lítið sømiligt fyri túsundárahaldið. Tann vakra altartalvan í Christianskirkjuni, sum flest øll eru samd um er rættuliga prýðilig, stavar úr Viborg, og Asbjørn Lómaklett og hinir stigtakararnir til innsavningina halda tað vera rættuliga løgið, og hartil ófólkaligt at nokta hægsta kirkjuliga mynduleika í Viborg, at prædika í Christianskirkjuni.

Ætlanin er at senda allar undirskriftirnar til Føroya bisp, soleiðis at hann kann síggja, at klaksvíksingar ikki eru samdir í hesum máli, soleiðis at hann síggja, at orsøk er til at broyta tiknu avgerðina. Tey, ið standa fyri innsavningini av undirskriftunum siga seg ikki vera heilt greið yvir, um bispur, útfrá samlaðu undirskriftiunum, kann broyta nakra tikna avgerð í hesum máli, men tey halda at tað undir øllum umstøðum ein fínur máti at vísa sína ónøgd

Ásbjørn Lómaklett sigur at enda, at hann ivast stórliga um Karsten Nissen vil prædika í Klaksvík hóast alt, um avgerðin hjá kirkjuráðnum og teimum báðum prestunum í Klaksvík skuldi verið broytt, eftir tað ringu viðferð hann hevur fingið.


## Málskeið í Aberdeen

Lærið enskt á Aberdeen Centre for English



Aberdeen Centre for English er ein lítil og hugnaligur privatskúli, sum liggur við Duthie Park í Aberdeen.

Skeið eru bæði fyri byrjarar og tey, sum longu duga eitt sindur av enskum.

Nærri upplýsingar og faldari um skúlan fáast hjá Atlantic Airways.

| 4 dagar | 1 vika | 2 vikur | 3 vikur |
|---|---|---|---|
| Gist verður á hotelli/ gistingarhúsi | Gist verður hjá vertsfamilju | Gist verður hjá vertsfamilju | Gist verður hjá vertsfamilju |
| **Kr. 5.530,-** | **Kr. 5.995,-** | **Kr. 9.955,-** | **Kr. 13.985,-** |
| Eyka fyri einakamar kr. 500,- | Eyka fyri einakamar kr. 315,- | Eyka fyri einakamar kr. 625,- | Eyka fyri einakamar kr. 900,- |

*Íroknað prísin er flogferð, innivist við 1/2 pensión, undirvísing, støðisroynd, prógv og undirvísingartilfar. Afturat prísinum kemur ferðaavgjald.*

**ÚTFERÐARPAKKI fyri skeiðluttakarar, sum eru á skeiði í 1, 2 og 3 vikur**
City Tour, Scottish Evening, Cinema/Theatre, Castle Visit/Whisky Distillery/ Museum/Highland Games, Edinburgh/Glasgow or Royal Deeside **Kr. 720,-**

SANSIR TEL 355 355

Atlantic Airways
Tel 333 900